TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Vøggustovan og barnagarðurin við Velbastaðvegin**

Á stovninum ganga 101 børn.

Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 10 børnum í hvørjari. 1. januar í ár varð stovnurin kommunalur og lagdur undir ein leiðara. Fyri framman liggja útbyggingar og nýtímansgerð av stovninum, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar bæði fyri børn og starvsfólk verða munandi betur. Tá stovnurin er liðugt umbygdur summarið 2005, er ætlanin at hava forskúlastovu, og barnatalið lækkar í barnagarðstovunum niður í 18.
Frá 1. mars 2004 verður stovnurin skipaður við einum leiðslutoymi við einum leiðara og tveimum varaleiðarum, har tíð er sett av til leiðslu hjá báðum varaleiðarunum. Tann, ið settur verður, kemur at hava sítt dagliga yrki á vøggustovuni.

Stovnurin er 30 ár og liggur sera væl fyri við stórum og fjøltáttaðum spæliplássi og stutt er burtur í haga, oman í Sandá og fjøru.

www.torshavn.fo

## Varaleiðari til vøggustovuna og barnagarðin við Velbastaðvegin

Tórshavnar kommuna søkir eftir varaleiðara 40 tímar um vikuna til barnagarðin og vøggustovuna við Velbastaðvegin at byrja 1. mars 2004.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika til at seta tín dám á stovnin
- ávirkan á leiðslubygnaðin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit ynskja at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- tekur tær av tí dagliga umsitingarliga arbeiðinum í samstarvi við leiðaran, samstundis skalt tú vera eldhugaður fyri tí pedagogiska arbeiðinum við børnunum
- hevur holla ástøðiliga vitan
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag merktan av virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfelagunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- sært møguleikar framum forðingar
- hevur kunnleika til KT-tøkni

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr, leiðara, og Ingilín Berg, varaleiðara, tlf. 31 43 73.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera vøggustovuni- og barnagarðinum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. januar 2004.




## Kokkur/dekkari

Søkt verður eftir fulltiknum kokki/dekkara til farmaskip í altjóða sigling.

Áhugað kunnu venda sær til tlf. 77 00 47.

**Pf. Heri Thomsen**
FO-510 Gøta

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3366, Sp/f Vága Catering, 380 Sørvágur.

Viðtikið 11.12.2003 at lækka partapeningin við kr. 100.000,00 til kurs 100 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

*Skráseting Føroya tann 14. januar 2004*

*Kristin Balle*

Sosialurin



## Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

### Grundskeið í sveising

16.- 17.- 18.- 19.- 20. februar 2004 kl. 08.10-15.30

**Skeiðið umfatar:** Ástøðiliga og handaliga undirvísing innan gass-, elektrodu-, MIG/MAG og TIG-sveising.

**Skeiðleiðari:** Jeffri Olsen
**Kostnaður:** 4.800,00 kr. íroknað tilfar og mat
**Tilmelding:** **Áðrenn 10. februar 2004**

Yrkislærd við lærubrævi frá Føroya Læruráð/Yrkisdeplinum kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum. Vanliga fáa umsøkjarar, ið lúka treytirnar ein part av skeiðsgjaldinum endurgoldið.

Umsøkjarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð fáast á Skeiðsdeplinum.

Tilmeldast kann eisini á okkara heimasíðu:
**www.skeidsdepilin.fo**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo
www.skeidsdepilin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3708
**Navn:** Sp/f Jóannes Johannesen
**Adressa:** 900 Vágur.
**Kommuna:** Vágs Kommuna
**Stovningardato:** 01.01.2004
**Viðtøkudato:** 01.01.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Jóannes N. Johannesen, 900 Vágur.
**Stjórn:** Jóannes N. Johannesen, 900 Vágur.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f HanSam, v/ Óli Regin Hansen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er byggivirksemi, keyp, søla og annað í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 14. januar 2004*

*Kristin Balle*

Sosialurin
-tað loysir seg

Spírin



Zoneterapi
Oyraakupunktur
Kostvegleiðing

Sanna Hentze
Fugloyarvegur 10
Tlf 31 61 14 / 25 34 14
Viðtala Mán.-Ley. 13:00 - 19:00

FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi, adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo








Altjóða Barnalegur CISV skipar fyri
**stuttligari og spennandi summarfrítíð !!!**

Børn og ung hava aftur í summar møguleikan at søkja um luttøku á CISV legum. Legurnar, sum á hvørjum ári, verða hildnar um allan knøttin, byggja allar á sama grundsjónarmið. Børnini koma, at liva saman við børnum úr nógvum øðrum londum, skapa vinarbond og læra um fólk og mentanir í hinum londunum.

Til legurnar í summar søknast vit eftir børnum og leiðarum.

- **Barnalegur** Hesar legurnar eru fyri 11-ára gomlum børnum, og vara í 4 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Summarlegur** Tey ungu skulu verða 14 - 15 ár. Tær legurnar vara í 3 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Interchange** Millum børn úr Suðuroy og ein bý í Finnlandi. Ein bólkur við leiðara og 8 ungum í aldrinum 12-13 ár úr hvørjum landi eru saman í ein mánað. 14 dagar í hvørjum landi.
- **Ungleiðarar** Til nakrar legur hava vit brúk fyri 16 og 17 ára gomlum ungleiðarum.
- **Leiðarar** Leiðarar skulu verða í minsta lagi 21 ár. Hava hug og hegni at fáast við børn og ung og duga væl at samstarva við onnur.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg og vil frætta meira, ert tú vælkomin at ringja til Tóru Tórgarð tlf 321961 ella 221590, har tú eisini fært umsóknarblað. Freistin at søkja er 1. feb. 2004.

ALTJÓÐA BARNALEGUR
AN INDEPENDENT, NON-POLITICAL, VOLUNTEER ORGANISATION PROMOTING PEACE EDUCATION AND CROSS CULTURAL FRIENDSHIP

Valevni Javnaðarfloksins møta veljarunum í Billiardhúsinum í Vági, fríggjakvøldið, aftaná valfundin á Eiðinum.

nakað fyri

**Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag**
www.javnadarflokkurin.fo

## Hús í Vági til sølu

Hús í Lágabø til sølu.

Prísur kr. 400.000,-

**Tlf. 37 38 74 ella 22 85 91**

## Bilar til sølu

**Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler 5 setur**




Gráur metalllakk · Árgang 1999 · Km. 95.000 · 5 setur
Aircondition · Altimetur · El-spegl · El-rútar framman
Hita í setrum · Tokulyktir · Lættmetalfelgur við heilársdekkum
Summardekk fylgja við · Vælhildin

**Mercedes CLK 320 Avantgarde aut. bensin**



Árgang 2001 · Km. 20.000 · Automat gear tiptronic · 4 setur
Gráur mettallakk · Klimaanlegg · Grá leðursetur við hita
Multifunktiónsróður · Parkeringssensorar · Mercedes anlegg
við fleiri diskum · 6 stk Bose hátalarar · innbygda telefon
og nógv annað. Nýprísur kr. 850.000,-
Til sølu um hóskandi boð fæst.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Termodrakt

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini



TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**

## Býráðsfundur avlýstur

Býráðsfundurin ið lýstur er at verða 29. januar 2004 er avlýstur.

**Runavíkar býráð**




## Suðurstreymoyar Sjálvstyrisfelag

*Sjálvstýrisflokkurin hevur kafé á Kafé Karlsborg í Vágsbotni*

*fríggjadagin og sunnudagin frá kl. 15.00 til 23.00*

*leygardagin og mánadagin frá kl. 10.00 til 23.00*

*og týsdagin frá kl. 10.00*

*Fríggjakvøldið og leygarkvøldið undirhalda Terji Rasmussen og Svenn Brimheim frá kl. 21.00 til kl. 23.00.*

*Høvið verður at hitta valevnini.*

**Sjálvstýrisflokkurin**
www.sjalvstyrisflokkurin.fo

## Vágafólk

Fríggjakvøldið kl 19.30 verður Javnaðarcafe í SÍ húsinum í Sørvági. Á skránni verður tónleikur, skemt og felagssangur.

Øll eru vælkomin.

nakað fyri

**Vága Javnaðarfelag**
www.javnadarflokkurin.fo